


# STUÐULSSKIPAN

ÚRVAL

# Reglugerð fyri Úrval

Dagførd á aðalfundi 9. mai 2026.

ÍSF strategi 2022-2026
*Í felag fram ímóti felags málum*

Ítróttasamband Føroya
Eystara Bryggja 30
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
isf@isf.fo
www.isf.fo

# Innihaldsyvirlit

**Innihaldsyvirlit** 2

**Ein nýggj stuðulsskipan** 4

**Úrval** 6

Eitt úrvalsítróttarfólk 6

Hvørjum stuðlar Úrval? 9

Aðalmál Úrvals 10

Virðir Úrvals 11

Vit eru framsøkin 11

Vit eru áhugað 11

Vit eru nærløgd 11

**Stuðul frá Úrvali** 12

Ein fimmbýtt stuðulsskipan 12

Úrvalssamband - stig 1 13

Úrvalssamband - stig 2 14

Úrvalssamband - stig 3 15

Úrvalssamband - stig 4 16

Úrvalspuljan - stig 5 17

Stutt yvirlit yvir stuðul frá Úrvali 18

Fyrisitingarlig krøv til úrvalssambond á stigi 1-4 19

Fíggjarligt býti millum stigini 20

Løn til íðkarar 22

**Úrvalsmiðstøðin** 22

Ein serføroysk skipan 23

Úrvalssamskipari 23

Stuðulsraðfesting 23

Menningartiltøk hjá Úrvali 25

Krøv fyri luttøku á menningartiltøkum 25

**Umsókn, sáttmáli og úrvalsætlan** 26

Úrvalsætlan 27

Samrøða 27

Umsóknarfreist 27

Sáttmáli millum ÍSF og avvarðandi samband 27

Frágreiðing til ÍSF 28

**Stuðulstreytir** **29**
Nýtsla av fíggjarligum stuðli 29
Tiltøk og væntanir av teimum, ið fáa stuðul 30
Doping 31
Aldursmark 31
Frágreiðing skal sendast til ÍSF 31
Skattur 31
Trygging 31
Útgjald 31
Ábyrgd og endurgjald 31
Brot á sáttmála ella treytir 31
**Reglugerð og leiðreglur** **33**
Reglugerð 33
§ 1 Navn og heimstaður 33
§ 2 Endamál 33
§ 3 Nevnd 33
§ 4 Virksemi og umsiting 33
§ 5 Roknskapur, grannskoðan og ársfrágreiðing 34
§ 6 Virksemi 34
§ 7 Viðtøkubroytingar 34
§ 8 Avtøka 34
Leiðreglur fyri Úrval 34

# Ein nýggj stuðulsskipan

Strategiin hjá ÍSF 2022-2026, "*Í felag fram ímóti felags málum*", bleiv viðtikin á aðalfundi í mai 2022. Eitt av átøkunum í strategiini var at endurskoða reglugerðina fyri Úrval. Í sambandi við endurskoðanina bleiv ein arbeiðsbólkur settur. Í bólkinum sótu Elin H. Joensen, Magnus Tausen, Hávard Vatnhamar (starvsnevndin og íðkaranevndin í ÍSF), Páll Isholm (nevndin í Úrvali) og Petur Mittún (umsitingin í ÍSF). Harumframt bleiv Signar Hilmarsson settur sum verkætlanarleiðari.

Arbeiðsbólkurin hevði til uppgávu at endurskoða verandi úrvalsreglugerð. Endurskoðanin skuldi hava fyrilit fyri menningarmøguleikum og vera í samsvari við nútíðar úrvalsítróttin í Føroyum. Ein partur av ítróttinum, sum hevur verið í støðugari menning seinnu árini.

Eldra úrvalsreglugerðin, ið hevur verið galdandi síðan 2014, hevði eina tríbýtta stuðulsskipan, har strong krøv um ítróttalig avrik vórðu sett til bólk 1, ið fekk 80 % av stuðlinum. Bólkur 2 hevði væl linari krøv og fekk 20 % av stuðlinum, meðan bólkur 3 fekk 100.000 kr. at brúka til menningartiltøk fyri ung ítróttarfólk við góðum avrikum og ágrýtni.

Nýggja reglugerðin byggir á grundarlagið í eldru reglugerðini, á stuðulsskipanir hjá grannalondum, á gransking innan úrvalsítróttin (eitt nú SPLISS) og á støðuna hjá føroyska úrvalsítróttinum. Stuðulin frá Úrvali verður skipaður í eina stuðulsskipan við fimm stigum, har hvørt stig hevur ymiskar treytir til ítróttarlig avrik og fyrisiting. Krøv verða sett bæði til íðkarar og til avvarðandi samband. Øll sambond, ið samstarva við Úrval, kunnu kalla seg eitt úrvalssamband og skulu sjálvi í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi, og Úrval fíggjar í mesta lagi 75 %. Sum nakað nýtt er peningurin ikki oyramerktur til júst tað ítróttarfólkið ella liðið, ið hevur lokið krøvini, men til sambandið at brúka til sítt úrvalsvirksemi. Eisini verður møguligt at brúka 15 % av samlaða stuðlinum til útgerð, ið beinleiðis verður nýtt av úrvalsíðkarum ella í úrvalsvirkseminum hjá sambandinum. Aftur at stuðlinum til úrvalssambond fer Úrval at skipa fyri regluligum menningartiltøkum fyri ítróttarfólk við góðum avrikum og ágrýtni. Hesi tiltøk miða eftir ítróttaligari menning og eftir at skapa samstarv, sparring og felagsskap millum ítróttargreinar. Øll sambond hava møguleika at tekna íðkarar og venjarar til hesi menningartiltøk.

Sum partur av hesi nýggju stuðulsskipan skal ein úrvalsmiðstøð setast á stovn. Hendan miðstøð fer at vera undir støðugari menning komandi árini, treytað av at játtanin til Úrval veksur. Fyrsta stig í hesari tilgongd er at seta ein úrvalssamskipara, sum skal leggja eina ætlan fyri miðstøðina. Úrvalssamskiparin verður eftir ætlan settur 1. jan 2025. Úrvalssamskiparin skal hava viðkomandi hægri útbúgving innan ítrótt og skal virka eftir nýggju stuðulsskipanini, samskipa tey átøk og tiltøk, ið eru partur av hesi skipan og vera ábyrgdarfólk, ið skal standa fyri samstarvinum millum Úrval og úrvalssambond. Málið er, at miðstøðin fer í gongd í 2025. Í fyrstu atløgu fer miðstøðin at virka sum vitanardepil innan úrvalsítróttin í Føroyum. Eitt nú fer Úrval at samla lækna, fysioterapi, ítróttarsálarfrøði, kostráðgeving, kropsliga venjing, sinnisvenjing, ráðgeving og líknandi. Sum játtanin til Úrval veksur, verður úrvalsmiðstøðin eisini ein venjingarmiðstøð, sum skapar karmar hjá úrvalsíðkarum tvørtur um greinar at hittast, samstarva og sparra.

Sum partur av úrvalsvirkseminum miðar ÍSF eftir at seta eina serstaka játtan upp á 200.000 kr. av til løn til úrvalsíðkarar. Úrvalsíðkarar kunnu søkja um lønarstuðul av hesi játtan. Lønarstuðulin skal hjálpa íðkarum í

teirra gerandisdegi, so at teir kunnu brúka meira tíð til sín ítrótt og minni tíð upp á arbeiði í eitt tíðarskeið, serliga upp undir kappingar, ið krevja stórar venjingarmongdir og fyrireiking. Hesin lønarstuðul er treytaður av, at játtanin til Úrval veksur.

Eisini hevur ÍSF víst á, at verandi fyrisiting av næmingum á miðnámi, sum fáast við úrvalsvirksemi, ikki er nøktandi. Verandi skipan hevur áseting um, at næmingur kann vera 10 dagar burtur frá undirvísing. ÍSF metir, at tørvur er á at fáa eina skipan, har næmingurin fylgir undirvísingini, hóast hann er burtur frá skúlagongdini vegna ítrótt. Í hesum sambandi bleiv ein royndar- og menningarætlan sett í verk á sumri 2023. Skúlarnir skipa eitt ÍSF-tilboð, so at íðkarin kann samskipa skúlagongd og ítrótt. Kravið er, at íðkarin fylgir undirvísingini og fær møguleika at gjøgnumføra gymnasialt miðnám á sama stigi sum onnur. Tilboðið verður skipað sum eitt samstarv millum næming, skúla og ÍSF/sersambondini.

Nýggja úrvalsskipanin er ein stór broyting frá verandi úrvalsskipan, ið krevur tillagingar í úrvalsvirkseminum hjá Úrvali og hjá sambondunum. Við fyrivarni fyri at Úrval ella sambondini vilja broyta partar av reglugerðini, eftir at hon er viðtikin, skal reglugerðin eftirmetast, eftir at hon hevur verið í gildi í tvey ár. Skipanin bleiv viðtikin á aðalfundi 4. mai 2024, tikin í nýtslu 1. januar 2025 og skal eftirmetast á aðalfundi 2027.

Sum partur av endurskoðanini hevur arbeiðsbólkurin givið hesum áhugapørtum møguleikan at koma við teirra íkasti og viðmerkingum til nýggju reglugerðina.

- Íðkaranevndin, Nevndin fyri Úrval, Mentamálaráðið, Fróðskaparsetur Føroya og øll sambondini undir ÍSF.

Eisini hevur arbeiðsbólkurin samskift við úrvalsítróttarumhvørvið í Danmark, Íslandi og Norra.

# Úrval

Úrval er ein savnandi skipan fyri føroysk úrvalsítróttarfólk, sum umboðar avvarðandi sambond hjá ÍSF og Merkið. Úrval stuðlar føroyskum úrvalsítróttarfólkum, tá ið tey kappast fyri Føroyar og kann ikki stuðla úrvalsítrótti umboðandi aðrar tjóðir enn Føroyar. Hetta merkir, at avrik, ið verða avrikað av íðkarum, umboðandi aðrar tjóðir enn Føroyar, ikki verða viðurkend í eini umsókn til Úrval.[1]




Føroysk úrvalsítróttarfólk hugtaka, kveikja og samla Føroyar á heilt serstakan hátt, tá ið tey dúgliga fremja sín ítrótt á altjóða pallinum og kempa fyri Føroyar. Úrval arbeiðir fyri at menna og stuðla føroyskum úrvalsítróttarfólki og úrvalsítróttarumhvørvinum á sosialan og samfelagsvirðiligan hátt.

## Eitt úrvalsítróttarfólk

Eitt úrvalsítróttarfólk íðkar sín ítrótt við serligum eldhuga og serligari framsókn, ið geva góð altjóða úrslit. Sum úrvalsítróttarfólk hevur mann ein gyltan møguleika at fylgja sínum dreymum um at gerast best. Tað gevur serstakar upplivingar og mennir persónligar eginleikar, ið ein kann brúka restina av lívinum. Vegurin til slíkt úrvalsstøði hevur ongar sniðgøtur.

Tað er ein avgerð at vera úrvalsítróttarfólk og at lofta møguleikanum fyri at fara málrættað eftir dreyminum. Altjóða ítróttur setur stór krøv til tað einstaka úrvalsítróttarfólkið, bæði kropsligt og persónligt, um

[1] Undantak verður einans gjørt, um eitt úrvalsítróttarfólk/lið, ið áður hevur umboðað aðra tjóð, fær møguleikan og velur at kappast fyri Føroyar. Í hesum skifti, verða avrik viðtikin, ið eru avrikað fyri aðrar tjóðir enn Føroyar.

dreymurin er at gerast ein av teimum bestu í heiminum. Tað liggur eitt stórt trýst á tí einstaka úrvalsítróttarfólkinum. Tú ferðast ofta í einum umhvørvi, har kappingin er hørð, úrval er gerandisdagur, liðfelagar kunnu eisini vera mótstøðufólk, og mørkini fyri, hvat er gjørligt, skulu javnan flytast, um tú vilt vera best.

Úrvalsumhvørvið kann vera hart, og hesin veruleiki bindur øll í hesum umhvørvi til at arbeiða út frá sunnum og tryggum virðum, ið hava fyrilit fyri at úrvalsítróttarfólkið eisini er eitt menniskja, ið skal trívast og mennast.



Altjóða kappingarstøðið gerst alsamt hægri, og tað merkir, at jagstranin eftir teimum smáu broytingunum, ið kunnu gera úrvalsítróttarfólkið betri, gerast alsamt meira umráðandi. Tí er tað ein treyt hjá úrvalsítróttarfólki at skipa seg soleiðis, at mest kemur burtur úr øllum parametrum, um dreymurin um at gerast best, skal gerast til veruleika. Við øðrum orðum verður einki ítróttarfólk heimsins besta, um tað ikki er hugað at skipa sína tilveru og leggja alla megi í at at klára at røkka sínum ítróttarmálum.

Tað eru bæði val og vandar knýtt at eini úrvalsítróttarleið. Tað krevur stórar og harðar venjingarmongdir fyri at menna seg til altjóða úrvalsíðkara. Eitt lív sum úrvalsítróttarfólk kann tí vera knýtt at skaða og ávísum kropsligum sliti. Ein fokuserað úrvalsítróttarleið kann eisini viðføra, at eginbúskapur í ávís tíðarskeið er avmarkaður, samstundis sum onnur viðurskifti í lívinum verða útsett; kanska ein bíðar við at fáa sær børn til seint á úrvalsítróttarleiðini, tá ið stóra venjingarmongdin er løgd á hillina, ella ein kann brúka longri tíð upp á sína útbúgving. Tað er ikki lætt at gerast best í sínum ítrótti, og vegurin upp á tindarnar er lagdur við hørðum venjingardøgum, við møði, við mótstøðu og við vónbrotum men eisini við stoltleika og løtum við ovurstórari gleði, ið bert úrvalsítrótturin kann skapa.

Úrval skal virka á sunnum og samfelagstryggum virðum, og tí skal úrvalsíðkarin ikki bert eggjast at røkka altjóða úrslit á hægsta stigi, men eisini at samskipa egið lív. Skúlagongd, heimaarbeiði og arbeiði skulu virka saman við venjing, kappingum og einum væl skipaðum familjulívi og sosialum lívi. Úrval eggjar øllum at hava fyrilit fyri úrvalsíðkaranum sum menniskja, ið skal trívast og mennast. Eisini uttan fyri ítróttin.

Úrvalsítróttur er ikki fyri øll, men ein úrvalsítróttarleið kann vera ógvuliga innihaldsrík. Tú upplivir javnan avbjóðingar og mennir teg bæði kropsliga og persónliga. Tú ognar tær vinabond og upplivingar í serflokki, sum bert eru unt úrvalsítróttarfólki. Tú fær møguleikan at brúka ein stóran part av tíni tíð upp á tín brennandi áhuga - tín ítrótt.

Úrvalsítróttarfólk eru áhaldin, miðvís, áhugað og framsøkin og eru sinnað at gera alt í teirra valdi fyri at náa teimum málum, tey seta sær fyri.
Hesar fortreytir, ið hoyra til úrvalsítróttin, binda serliga venjarar, leiðarar, sambond og Ítróttasamband Føroya til at stuðla hesum úrvalsítróttarfólki at náa sínum málum. Hetta skal gerast út frá sunnum og tryggum virðum, ið hava fyrilit fyri fortreytunum hjá tí einstaka úrvalsítróttarfólkinum og tí einstaka menniskjanum.

***Úrval kempar fyri føroysk úrvalsítróttarfólk, so at tey kunnu kempa fyri Føroyar!***



# Hvørjum stuðlar Úrval?




**Mynd 1. Úrvalspyramidan:** Úrvalspyramidan myndar trý ymisk løg av Úrvali.

Mátin Úrval kempar fyri føroysk úrvalsítróttarfólk er við at veita fíggjarligan stuðul (s. 29 "*Nýtsla av fíggjarligum stuðli*") og menningarstuðul (s. 25, "*Menningartiltøk hjá Úrvali*") til úrvalsítróttarfólkið og teirra avvarðandi úrvalssamband. Tey, ið fáa stuðul frá Úrvali, eru tey, ið eru ovarlaga í úrvalspyramiduni, og eisini tey, ið hava góð útlit at røkka toppinum. Úrval veitir ovasta partinum av úrvalspyramiduni fíggjarligan og menningarligan stuðul. Og tey, ið hava góð útlit at náa ovasta partinum av úrvalspyramiduni, men ikki hava nátt hesum enn, fáa menningarstuðul, ið skal stuðla teimum á úrvalsítróttarleiðini til toppin.

Úrval veitir menningarstuðul og atgongd til úrvalsmiðstøðina, men ikki beinleiðis fíggjarligan stuðul til íðkarar ella lið, ið kappast til ungdómskappingar, ella sum eru í ungdómsúrvali. Ungdómskappingar eru til dømis ungdóms-HM og -EM.

Úrval stuðlar bert altjóða úrvali á hægsta støði. Aftur at hesum skal luttøkan til kappingar, sum úrvalsíðkarar luttaka í, vera breið, og kappingarstøðið skal vera á ella tætt við altjóða úrvalsstøði. Hetta er millum annað galdandi í ymisku ítróttargreinunum, vektklassunum, greinunum og paralympisku flokkingunum. Úrval og avvarðandi samband skulu samstarva um at tryggja eitt altjóða úrvalsstøði í teimum umsóknum, ið verða sendar Úrvali. Tað er Úrval, ið stendur við evstu avgerð, hvørt ein ítróttargrein, vektklassi, grein ella paralympiskur flokkur hevur nóg breiða luttøku, og um kappingarstøðið er á ella tætt við altjóða úrvalsstøði.



# Aðalmál Úrvals

Úrval arbeiðir miðvíst eftir, at føroyskur úrvalsítróttur skal vera undir støðugari menning, so at fleiri evnaríkir íðkarar fylgja sínum dreymum, og tað eydnast fleiri ítróttarfólkum at heinta stórar upplivingar til Føroyar. Hátturin Úrval kempar fyri føroysk úrvalsítróttarfólk er millum annað við at seta sær aðalmál, ið skulu tryggja føroyskum úrvalsítróttarfólki góðar karmar.

Úrval skal virka fyri og grunda sínar avgerðir á:

- At støðið í øllum føroyskum úrvalsítrótti alsamt hækkar, so flest møgulig ítróttarfólk røkka altjóða støði.
- At tað verða fleiri føroysk úrvalsítróttarfólk á heimsstyrkilistanum í teirra ítróttargrein.
- At menna og stuðla serliga evnaríkum og ágrýtnum ítróttarfólki, sum kunnu gerast úrvalsítróttarfólk.
- At menna og stuðla evnaríkum ungdómum, ið hava nátt ella hava útlit innanfyri eitt avmarkað tíðarskeið, at náa altjóða úrslit.
- At gera tað møguligt hjá úrvalsítróttarfólki at sameina ítrótt, útbúgving og arbeiði.
- At sameina úrvalsítrótt og úrvalsíðkarar tvørtur um ítróttargreinar.

# Virðir Úrvals

Úrval miðar eftir, at alt okkara virksemi er skipað eftir trimum virðum. Hesi virðini skulu virka fyri at sameina og seta kós fyri føroyska úrvalsítróttin. Úrval mælir til, at øll taka hesir virðir til sín og virka eftir teimum.

## *Vit eru framsøkin*

At vera framsøkin snýr seg um, at vit vilja skapa eitt úrvalsumhvørvi á altjóða støði. Fyri at vera framsøkin krevst áhaldni, ágrýtni og dirvi at síggja møguleikar heldur enn forðingar og arbeiða fyri at gera dreymar til veruleika.

## *Vit eru áhugað*

Áhugi er eitt virði, ið drívur okkara arbeiði fram á leið og gevur okkum rúm at vera opin, nýhugsandi og skapandi í okkara tilgongd. Áhugin fevnir eisini um gleðina, ið kemur av at søkja nýggjar avbjóðingar.

## *Vit eru nærløgd*

Nærlagni snýr seg um at vera ábyrgdarfull, fólkalig og rættvís. Óansæð trýst, taka vit ábyrgd, vísa virðing og bera okkum fólkaliga og rættvíst at, hóast hetta til tíðir merkir at vit tapa. Vit eru óvikilig í okkara nærlagni og broyta ikki atburð undir trýsti.

# Stuðul frá Úrvali




## Ein fimmbýtt stuðulsskipan

Stuðulin frá Úrvali er skipaður í fimm stig, ið øll hava ymiskar treytir. Øll sambond, sum samstarva við Úrval, eru eitt úrvalssamband. Krøv vera sett bæði íðkarum og úrvalssambondum. Stuðulin verður bert latin, tá ið øll krøv eru lokin. Lið ella einstaklingur kann bara fáa stuðul úr einum úrvalsstigi samstundis. Úrslit skulu vera avrikað seinastu 2 árini undan at nýggjur sáttmáli verður gjørdur millum Úrval og samband. Tó 4 ár fyri OL og PL.



## Úrvalssamband - stig 1

Stuðulin, ið verður givin úrvalssambondum á stigi 1, er fíggjarligur og við hægstu stuðulsraðfesting hjá Úrvali. Fíggjarliga býtið til úrvalssambond á stigi 1 er 40 %. Stuðulin er áhaldandi í 2 ár, treytað av at báðir partar virða treytirnar fyri samstarvinum. Um grundarlagið undir umsóknini broytist í tíðarskeiðinum, sambandið fær stuðul, hevur Úrval heimild til at steðga stuðlinum beinanvegin ella stytta um tíðarskeiðið, stuðulin verður veittur.

### Krøv til úrvalssambond á stigi 1

1. **Krøv til ítróttalig avrik**
   a. **Topp 16 til OL/PL/HM/EM, ella samsvarandi altjóða góðkent avrik**
   b. **Ítróttargreinin skal vera IOC-/IPC-viðurkend**
   c. **Krav a. skal vera avrikað seinastu 2 árini, tó 4 ár fyri OL og PL**

2. **Krøv til fyrisiting**
   a. **Sambandið skal hava eitt ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum hjá sambandinum (s. 19)**
      i. **Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt**
   b. **Sambandið skal gera og virka eftir eini úrvalsætlan (s. 19, 27)**
   c. **Sambandið skal í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi (s. 19)**
   d. **Úrvalsítróttarfólkið/liðið skal umboða Føroyar**
   e. **Sambandið skal gera eitt 2 ára samstarv við Úrval**
   f. **Stuðulstreytir og væntanir skulu haldast (s. 29-31)**

## Úrvalssamband - stig 2

Stuðulin, ið verður givin úrvalssambondum á stigi 2, er fíggjarligur og hevur aðru stuðulsraðfesting hjá Úrvali. Fíggjarliga býtið til úrvalssambond á stigi 2 er 20 %. Stuðulin er áhaldandi í 2 ár, treytað av at báðir partar virða treytirnar fyri samstarvinum. Um grundarlagið undir umsóknini broytist í tíðarskeiðinum, sambandið fær stuðul, hevur Úrval heimild til at steðga stuðlinum beinanvegin ella stytta um tíðarskeiðið, stuðulin verður veittur.

### Krøv til úrvalssambond á stigi 2

1. **Krøv til ítróttalig avrik**
    a. **Topp 32 til OL/PL/HM/EM, ella samsvarandi altjóða góðkent avrik**
    b. **Ítróttargreinin skal vera IOC-/IPC-viðurkend ella hava minst 40 skrásettar tjóðir hjá avvarðandi altjóða sersambandi, ið eisini hava úrvalsvirksemi**
    c. **Krav a. skal vera avrikað seinastu 2 árini, tó 4 ár fyri OL og PL**

2. **Krøv til fyrisiting**
    a. **Sambandið skal hava eitt ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum hjá sambandinum (s. 19)**
        i. **Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt**
    b. **Sambandið skal gera og virka eftir eini úrvalsætlan (s. 19, 27)**
    c. **Sambandið skal í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi (s. 19)**
    d. **Úrvalsítróttarfólkið/liðið skal umboða Føroyar**
    e. **Sambandið skal gera eitt 2 ára samstarv við Úrval**
    f. **Stuðulstreytir og væntanir skulu haldast (s. 29-31)**

## Úrvalssamband - stig 3

Stuðulin, ið verður givin úrvalssambondum á stigi 3, er fíggjarligur og hevur triðju stuðulsraðfesting hjá Úrvali. Fíggjarliga býtið til úrvalssambond á stigi 3 er 15 %. Stuðulin er áhaldandi í 2 ár, treytað av at báðir partar virða treytirnar fyri samstarvinum. Um grundarlagið undir umsóknini broytist í tíðarskeiðinum, sambandið fær stuðul, hevur Úrval heimild til at steðga stuðlinum beinanvegin ella stytta um tíðarskeiðið, stuðulin verður veittur.

### Krøv til úrvalssambond á stigi 3

1. **Krøv til ítróttalig avrik**
    a. **Topp 32 til OL/PL/HM/EM, ella samsvarandi altjóða góðkent avrik**
    b. **Einki krav er um IOC-/IPC-viðurkenning ella tal av skrásettum tjóðum**
    c. **Krav a. skal vera avrikað seinastu 2 árini, tó 4 ár fyri OL og PL**

2. **Krøv til fyrisiting**
    a. **Sambandið skal hava eitt ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum hjá sambandinum (s. 19)**
        i. **Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt**
    b. **Sambandið skal gera og virka eftir eini úrvalsætlan (s. 19, 27)**
    c. **Sambandið skal í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi (s. 19)**
    d. **Úrvalsítróttarfólkið/liðið skal umboða Føroyar**
    e. **Sambandið skal gera eitt 2 ára samstarv við Úrval**
    f. **Stuðulstreytir og væntanir skulu haldast (s. 29-31)**

## Úrvalssamband - stig 4

Stuðulin, ið verður givin úrvalssambondum á stigi 4, er fíggjarligur og hevur fjórðu stuðulsraðfesting hjá Úrvali. Fíggjarliga býtið til úrvalssambond á stigi 4 er 10 %. Stuðulin er áhaldandi í 1 ár, treytað av at báðir partar virða treytirnar fyri samstarvinum. Um grundarlagið undir umsóknini broytist í tíðarskeiðinum, sambandið fær stuðul, hevur Úrval heimild til at steðga stuðlinum beinanvegin ella stytta um tíðarskeiðið, stuðulin verður veittur.

### Krøv til úrvalssambond á stigi 4

1. **Krøv til ítróttalig avrik**
    a. **Luttøka til HM/EM**
    b. **Luttøka í sterkastu kapping í Evropa ella í heiminum. Kappingin skal vera á altjóða støði, so sum World Cup ella European Cup**
    c. **Einki krav er um IOC-/IPC-viðurkenning ella tal av skrásettum tjóðum**
    d. **Krav a. ella b. skal vera avrikað seinastu 2 árini**

2. **Krøv til fyrisiting**
    a. **Sambandið skal hava eitt ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum hjá sambandinum (s. 19)**
        i. **Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt**
    b. **Sambandið skal gera og virka eftir eini úrvalsætlan (s. 19, 27)**
    c. **Sambandið skal í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi (s. 19)**
    d. **Úrvalsítróttarfólkið/liðið skal umboða Føroyar**
    e. **Sambandið skal gera eitt  ársamstarv við Úrval**
    f. **Stuðulstreytir og væntanir skulu haldast (s. 29-31)**

## Úrvalspuljan - stig 5

Hesin stuðul er ætlaður sambondum við íðkarum ella liðum, ið hava stórar menningar- og avriksmøguleikar innan fyri eitt tíðarskeið upp á í mesta lagi 3 ár. Úrvalspuljan er á fimta stigi í stuðulsskipanini og fær 15 % av fíggjarliga býtinum. Stuðulin hevur skiftandi stuðulsraðfesting hjá Úrvali. Raðfestingarnar hava støði í menningar- og avriksmøguleikunum hjá umsøkjaranum. Stuðulin er áhaldandi í 1 ár, treytað av at báðir partar virða treytirnar fyri samstarvinum. Um grundarlagið undir umsóknini broytist í tíðarskeiðinum, sambandið fær stuðul, hevur Úrval heimild til at steðga stuðlinum beinanvegin ella stytta um tíðarskeiðið, stuðulin verður veittur.

### Krøv til úrvalspuljuna

1. **Krøv til ítróttalig avrik**
   a. **Úrvalspuljan er ætlað til stjørnuskot, ið hava góð sannlíkindi fyri at avrika á stigi 1-4 næstu 3 árini**
   b. **Lovandi menningar- og avriksmøguleikar innan HM/EM/PL/OL/NM ella aðrar størri altjóða kappingar**
      i. **t.d. eitt gott avrik til U17-21 HM/EM**
      ii. **t.d. eitt avrik til NM, har avrikið kann samanberast við góð avrik til HM/EM/PL/OL**
   c. **Hava luttikið javnan í størri ella minni altjóða kappingum við góðum úrslitum**
   d. **Einki krav er um IOC-/IPC-viðurkenning ella tal av skrásettum tjóðum**
   e. **Krav a., b. ella c. skal vera avrikað seinastu 2 árini, tó 4 ár fyri OL og PL**

2. **Krøv til fyrisiting**
   a. **Sambandið skal vísa á menningar- og avriksmøguleikarnar hjá íðkaranum/liðnum**
   b. **Ein ætlan skal gerast fyri íðkaran/liðið, og hvørjum avrikum miðað verður eftir**
   c. **Ein eftirmeting skal fara fram, ið vísir, hvussu stuðulin bleiv brúktur**
   d. **Úrvalsítróttarfólkið/liðið skal umboða Føroyar**
   e. **Sambandið skal gera eitt árssamstarv við Úrval.**
   f. **Stuðulstreytir og væntanir skulu haldast (s. 29-31)**

Um úrvalspuljan ikki røkkur til allar umsóknir, verða umsóknirnar við størri menningar- og avriksmøguleikum raðfestar hægri enn aðrar umsóknir. Ein serætlan skal samskipast úrvalssamband og Úrval ímillum, men sum heild eru somu treytir galdandi fyri umsøkjarar í úrvalspuljuni sum fyri úrvalssambond á stigi 1-4.

# Stutt yvirlit yvir stuðul frá Úrvali

Hetta er eitt stutt yvirlit, sí krøvini á síðu 13, 14, 15, 16, 17 og menningartiltøk á síðu 25.

<table>
<tr>
<td>
Úrvalssamband (stig 1) s. 13<br>
- Topp 16 til OL/PL/HM/EM<br>
- Ítróttargreinin skal vera IOC-/IPC-viðurkend<br>
- Ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum<br>
  - Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt<br>
- 2 ára samstarv við Úrval
</td>
<td rowspan="5">
Felags treytir<br><br>
Freist at søkja: 15. mai og 15 oktobur á hvørjum ári.<br><br>
Stuðulstreytir skulu haldast.<br><br>
Stuðulin skal bert nýtast til úrvalsvirksemi hjá sambandinum.<br><br>
15 % av samlaða stuðlinum kann fara til útgerð, ið beinleiðis verður nýtt av úrvalsíðkarum ella í úrvalsvirkseminum hjá sambandinum.<br><br>
Úrvalsítróttarfólkið skal umboða Føroyar.<br><br>
Eitt av ítróttaligu avrikunum skal vera avrikað seinastu 2 árini, tó 4 ár fyri OL og PL.<br><br>
Sambandið skal søkja um stuðulin, ikki íðkarin/liðið.<br><br>
*Frágreiðing skal sendast Úrvali tvær ferðir um árið.<br><br>
*Sambandið skal gera og virka eftir eini úrvalsætlan.<br><br>
*Sambandið skal í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi.<br><br>
*(Undantikið Úrvalspuljan)
</td>
</tr>
<tr>
<td>
Úrvalssamband (stig 2) s. 14<br>
- Topp 32 til OL/PL/HM/EM<br>
- IOC-/IPC-viðurkend ítróttargrein ella minst 40 skrásettar tjóðir<br>
- Ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum<br>
  - Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt<br>
- 2 ára samstarv við Úrval
</td>
</tr>
<tr>
<td>
Úrvalssamband (stig 3) s. 15<br>
- Topp 32 til OL/PL/HM/EM<br>
- Ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum<br>
  - Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt<br>
- 2 ára samstarv við Úrval<br>
- Einki krav um IOC-/IPC-viðurkenning ella tal av tjóðum
</td>
</tr>
<tr>
<td>
Úrvalssamband (stig 4) s. 16<br>
- Havi luttikið til HM/EM<br>
- Luttøka til sterkastu kapping í heiminum ella í Evropa<br>
- Ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum<br>
  - Landsliðsvenjari, nevndarlimur ella tílíkt<br>
- Árssamtarv við Úrval<br>
- Einki krav um IOC-/IPC-viðurkenning ella tal av tjóðum
</td>
</tr>
<tr>
<td>
Úrvalspuljan (stig 5) s. 17<br>
- Úrvalspuljan er ætlað stjørnuskotum, ið hava góð sannlíkindi fyri at avrika á stigi 1-4 næstu 3 árini<br>
- Stórir menningar- og avriksmøguleikar til HM/EM/PL/OL<br>
- Hava luttikið javnan í størri ella minni altjóða kappingum við góðum úrslitum<br>
- Ein ætlan skal gerast fyri íðkaran/liðið<br>
- Árssamtarv við Úrval
</td>
</tr>
<tr>
<td colspan="2">
Menningartiltøk hjá Úrvali s. 25<br>
- Menningarstuðulin skal menna fleiri ítróttarfólk, ið kunnu gera seg galdandi í altjóða kappingum. Málbólkurin er millum annað ítróttarfólk við ágrýtni og evnum at vinna heiðursmerki í altjóða kappingum, og ítróttarfólk, sum hava góð útlit at røkka framtíðar málum. Eingin krøv verða sett sambandinum. Tilmeldingarfreistir verða settar í samsvari við tiltøkini. Tiltøkini kunnu snúgva seg um: Lívið sum úrvalsítróttarfólk, venjing, kost, útbúgving, hvíld o.l.
</td>
</tr>
</table>

## Fyrisitingarlig krøv til úrvalssambond á stigi 1-4

**Úrvalssambandið skal hava eitt ábyrgdarfólk, ið tekur sær av úrvalsvirkseminum:**
Hetta fólkið hevur ábyrgdina av øllum arbeiðsuppgávum, ið eru knýttar úrvalsvirkseminum hjá sambandinum. Hetta er millum annað at samskifta við úrvalssamskiparan hjá ÍSF, at vera oddafólk, tá umræður at gjøgnumføra úrvalsætlanina og støðugt at menna úrvalsumhvørvið og úrvalstøðið hjá sambandinum.

**Úrvalssambandið skal hava eina úrvalsætlan:** Úrvalssambandið leggur eina framsøkna ætlan fyri, hvussu tað fer at reka sítt úrvalsvirksemi. Úrvalsætlanin skal lýsa eina heildarætlan fyri alt úrvalsvirksemið hjá sambandinum, og síðan sum ein nágreinilig ætlan fyri hvønn úrvalsíðkara/hvørt lið. Úrval virkar sum stuðul hjá sambondunum í menningini av teirra úrvalsætlan.

**Úrvalssambond skulu í minsta lagi fíggja 25 % av sínum egna úrvalsvirksemi:** Tað merkir, at um eitt samband raðfestir at nýta 100.000 krónur um árið til teirra úrvalsvirksemi, veitir Úrval í mesta lagi 75.00 krónur, altso, 75 % av upphæddini. Sambandið rindar tí 25.000 krónur av egnum fíggjarkarmi**.**




## Fíggjarligt býti millum stigini

Úrvalssambond (stig 1) fáa í mesta lagi tillutað ***40 %*** av fíggjarliga stuðlinum
Úrvalssambond (stig 2) fáa tillutað ***20 %*** av fíggjarliga stuðlinum
Úrvalssambond (stig 3) fáa tillutað ***15 %*** av fíggjarliga stuðlinum
Úrvalssambond (stig 4) fáa tillutað ***10 %*** av fíggjarliga stuðlinum
Úrvalspuljan (stig 5) fær tillutað ***15 %*** av fíggjarliga stuðlinum

Undantøk kunnu gerast í fíggjarliga býtinum millum stigini.
Nevndin í Úrvali hevur heimild at flyta pening millum stigini grundað á ítøkiliga heildarmeting í hvørjum útlutingarumfari.

### Útgjaldsloft

Einstaklingar á stigi 1 kunnu fáa upp til 300.000 kr. útgoldnar um árið.
Lið á stigi 1 kunnu fáa upp til 150.000 kr. útgoldnar fyri hvønn leikara (á leikvøllinum) um árið.

Einstaklingar á stigi 2 kunnu fáa upp til 160.000 kr. útgoldnar um árið.
Lið á stigi 2 kunnu fáa upp til 80.000 kr. útgoldnar fyri hvønn leikara (á leikvøllinum) um árið.

Einstaklingar á stigi 3 kunnu fáa upp til 80.000 kr. útgoldnar um árið.
Lið á stigi 3 kunnu fáa upp til 40.000 kr. útgoldnar fyri hvønn leikara (á leikvøllinum) um árið.

Einstaklingar á stigi 4 kunnu fáa upp til 20.000 kr. útgoldnar um árið.
Lið á stigi 4 kunnu fáa upp til 10.000 kr. útgoldnar fyri hvønn leikara (á leikvøllinum) um árið.

Einstaklingar ella lið í Úrvalspuljuni fylgja ásetingunum samsvarandi stigi 1-4. Tað er ein meting av ítróttaligu avrikunum og hvussu stórir menningarmøguleikarnir eru, sum gera av hvørjum stigi útgoldið verður eftir.

## Løn til íðkarar

Úrvalsstuðulin kann ikki nýtast at gjalda úrvalsítróttarfólkinum løn ella til persónlig endamál. Stuðulin skal einans nýtast til úrvalsvirksemið hjá úrvalssambandinum. ÍSF arbeiðir miðvíst við at økja játtanina til Úrval, soleiðis at 200.000 krónur av játtanini til Úrval skulu vera sermerkt løn til úrvalsíðkarar. Hetta er tó treytað av fígging, sum ikki er tøk í løtuni. Málið er, at henda skipan skal vaksa, so hvørt sum fíggjarliga grundarlagið undir Úrvali verður víðkað og styrkt.
Úrvalsíðkarar í úrvalssambondum og úrvalspuljuni kunnu søkja um lønarstuðul av hesi játtan. Lønarstuðlin er galdandi, so leingi íðkarin er góðkendur sum úrvalsítróttarfólk. Sáttmáli skal gerast millum ÍSF og íðkaran, ið fær løn.
Lønarstuðulin skal hjálpa íðkaranum í sínum gerandisdegi, so at hann eitt tíðarskeið kann brúka meira tíð upp á sín ítrótt og minni tíð upp á arbeiði í eitt tíðarskeið. Hetta serliga í tíðarskeiðinum fram móti eini kapping, ið krevur stórar venjingarmongdir og nógva fyrireiking.

Lønarstuðulin veitir 100 % endurgjald av mistari arbeiðsløn, tó í mesta lagi 30.000 krónur um mánaðin. Íðkarin kann søkja um at fáa løn í 3 til 12 mánaðir. Upphæddirnar, ið søkjast kann um, eru frá 10.000 kr. til 90.000 kr. og fevna um alt tíðarskeiðið.

Dømir um tíðarskeið og upphæddir, ið søkjast kann um:

A) 3 mánaðir, 10.000 kr. - Hetta gevur íðkaranum 3.333 kr. um mánaðin í 3 mánaðir.
B) 3 mánaðir, 90.000 kr. - Hetta gevur íðkaranum 30.000 kr. um mánaðin í 3 mánaðir.
C) 5 mánaðir, 40.000 kr. - Hetta gevur íðkaranum 8.000 kr. um mánaðin í 5 mánaðir.
D) 6 mánaðir, 60.000 kr. - Hetta gevur íðkaranum 10.000 kr. um mánaðin í 6 mánaðir.
E) 9 mánaðir, 90.000 kr. - Hetta gevur íðkaranum 10.000 kr. um mánaðin í 9 mánaðir.

Úrval skal í hvørjum einstøkum føri gera eina heildarmeting av íðkaranum, ið søkir um lønarstuðul. Tá verður mett um, um íðkarin hevur tørv á lønarstuðli, og hvussu nógvum tørvur er á. Úrval hevur heimild at broyta tíðarskeiðið og upphæddina, ið søkt verður um, tó ikki eftir at stuðulin er latin.

Íðkarin, ið søkir um lønarstuðul, skal fara niður í tíð á sínum arbeiðsplássi.

Um stuðulin ikki røkkur til allar umsøkjarar, verða íðkarar við bestu ítróttaligum avrikum raðfestir hægri enn aðrir umsøkjarar.

# Úrvalsmiðstøðin

Sum partur av hesi nýggju stuðulsskipan fer Úrval at bjóða stuðul umvegis eina úrvalsmiðstøð. Hendan miðstøð fer at vera undir støðugari menning komandi árini. Málið er, at miðstøðin verður sett á stovn í 2025, og at hon verður ment, so hvørt sum játtanin til Úrval veksur. Fyrsta stig er at seta ein úrvalssamskipara, sum skal leggja eina ætlan fyri miðstøðina. Úrvalssamskiparin verður eftir ætlan settur 1. jan 2025. Úrvalsmiðstøðin skal virka sum ein miðdepil, ið veitir øllum úrvalsítróttarfólkum fíggjarligan, kropsligan og

fakligan stuðul. Í fyrstu atløgu fer Úrval at raðfesta at savna ítróttarlæknar, fysioterapi, ítróttarsálafrøði, kostráðgeving, kropsliga venjing, sinnisvenjing og annars ráðgeving í Úrvali. Við tíðini verður úrvalsmiðstøðin eisini ein venjingarmiðstøð, har úrvalsíðkarar tvørtur um ítróttargreinar kunnu venja, hittast, samstarva og sparra.

## Ein serføroysk skipan

Úrval miðar í fyrsta lagi eftir, at sersambond menna sítt úrvalsvirksemi úti í sambandinum, men ásannar samstundis, at Føroyar eru eitt lítið land í altjóða kapping. Vit kappast við stórar tjóðir við fleiri ferðir so nógvum íðkarum, venjarum og fíggingarmøguleikum. Uppgávan hjá Úrvali er tí at stuðla sambondunum við at hava ein lutfalsligan stóran leiklut í úrvalsvirkseminum samanborið við aðrar tjóðir. Eitt nú við fyrrnevndu tænastum sum ítróttarlækna, fysioterapi, ítróttarsálarfrøði, kostráðgeving, kropsligari venjing, sinnisvenjing, ráðgeving og líknandi. Á hendan hátt megna vit at lyfta føroyska úrvalsítróttin á eitt altjóða støði, ið kann kappast við størri tjóðir. Úrvalsskipanin skal virka fyri og lætta um fíggjarligu byrðuna og effektivisera og savna vitanina um úrvalsvirksemi í Føroyum á einum stað til fyrimun fyri øll føroysk sambond.

## Úrvalssamskipari

Sum partur av hesi nýggju reglugerð og hesum nýggju átøkum fer ÍSF at seta ein úrvalssamskipara í starv. Miðað verður eftir, at samskiparin byrjar í hálvtíðarstarvið 1. januar 2025. Úrvalssamskiparin skal hava viðkomandi hægri útbúgving innan ítrótt. Hann skal virka eftir nýggju stuðulsskipanini, samskipa tey átøk og tiltøk, ið eru partur av hesi skipan og vera ábyrgdarfólk, ið skal standa fyri samstarvinum millum Úrval og úrvalssambond.

## Stuðulsraðfesting

Úrval stuðlar øllum úrvalsvirksemi í Føroyum og miðar eftir, at allir úrvalsíðkarar skulu fáa ágóða av hvørjum øðrum. Eitt nú við felags venjingum, samstarvi, sparring og einum livandi felagsskapi í úrvalsmiðstøðini. Um tørvur verður á at raðfesta tænastur hjá Úrvali, t.d. venjingartíðir í úrvalsmiðstøðini, tá ið felags venjing ikki ber til, so eru tað íðkarar og lið við bestu ítróttaligu avrikum og menningarmøguleikum, ið vera raðfest.



# Menningartiltøk hjá Úrvali

Úrval fer at menna alt úrvalsvirksemi í Føroyum. Tað merkir, at aftur at stuðlinum til úrvalssambond og úrvalspuljuna fer Úrval at skipa fyri regluligum menningartiltøkum. Øll sambond kunnu melda íðkarar og venjarar til. Tiltøkini miða eftir at stimbra og menna ágrýtnar evnaríkar íðkarar og venjarar teirra at vinna heiðursmerki í altjóða kappingum. Tiltøkini verða skipað upp á tvørs av ítróttargreinum fyri at birta upp undir eitt felags úrvalsumhvørvi. Sambandið skal melda íðkarar og venjarar til tey ymisku tiltøkini, so hvørt sum tiltøkini verða hildin.

Málini, ið verða sett fyri menningarstuðulin, eru:

- at stuðla evnaligum ítróttarfólkum at handfara tær avbjóðingar, sum koma á leiðini at gerast úrvalsítróttarfólk.
- at menna fleiri ítróttarfólk, ið gera seg galdandi í altjóða kappingum.
- at ítróttarfólk og venjarar fáa høvi at deila vitan og royndir.

Evni kunnu vera:

- *Lívið sum úrvalsítróttarfólk*
- *Kropslig venjing*
- *Sinnisvenjing*
- *Hvíld*
- *Ítróttarsálarfrøði*
- *Kostur*
- *Útbúgving*
- *Sosialur stuðul*
- *At røkja stuðlar*
- *Miðlar*

## Krøv fyri luttøku á menningartiltøkum

Umsøkjarin er ítróttarfólk við ágrýtni og evnum at vinna heiðursmerki í altjóða kappingum. Umsøkjarin kann eisini vera venjari hjá hesum ítróttarfólki ella venjarar, ið vilja menna sínar førleikar. Um stuðulin ikki røkkur til allar umsóknir, verða yngri ítróttarfólk við bestu ítróttaligum avrikum raðfest hægri enn aðrir umsøkjarar. Eftir nærri viðgerð kunnu íðkarar við ágrýtni og evnum, men sum enn ikki kappast í altjóða kappingum, eisini melda seg til menningartiltøk

# Umsókn, sáttmáli og úrvalsætlan

Um sambandið og avvarðandi úrvalsítróttarfólk lúka allar treytir fyri at søkja stuðul, so er bert eftir at senda Úrvali umsókn.
Úrvalssambond á stigi 1, 2 og 3 fáa áhaldandi stuðul í 2 ár, tí skal umsókn sendast annaðhvørt ár. Úrvalssambond á stigi 4 og 5 fáa áhaldandi stuðul í 1 ár , tí skal umsókn sendast hvørt ár.

Til umsøkjaran at fylla út

## Hvat fyri stuðul verður søkt um?

- ☐ Úrvalssamband stig 1
- ☐ Úrvalssamband stig 2
- ☐ Úrvalssamband stig 3
- ☐ Úrvalssamband stig 4
- ☐ Úrvalspuljan stig 5

## Upplýsingar

| |
|---|
| Samband: |
| Ítróttagrein: |
| Navn á ábyrgdarfólki við ábyrgd fyri úrvalsvirkseminum:<br>Samskiftisupplýsingar: |
| Navn á venjara:<br>Samskiftisupplýsingar: |
| Navn á ítróttarfólki/liði, ið hevur klára krøvini: |

## Stuðulsupphæddir

Árlig upphædd ið søkt verður um frá Úrval: ______________________________ kr.

Árlig upphædd ið sambandi rindar til egi úrvalsvirksemi: ______________________________ kr.

## Fylgiskjøl

- ☐ Úrvalsætlan
- ☐ Annað

Tilsamans viðheft skjøl: _____________
Tilsamans viðheftar síður: _____________

## Viðmerkingar

## Váttan frá sambandi

______________________ ____________________________________________

Dagfesting Undirskrift

# Úrvalsætlan

Úrvalssambandið ger eina framsøkna ætlan fyri, hvussu tað vil reka sítt úrvalsvirksemi. Úrvalsætlanin skal virka sum ein vegvísandi heildarætlan fyri alt úrvalsvirksemið hjá sambandinum, og sum ein nágreinilig ætlan fyri hvønn úrvalsíðkara. Úrval skal stuðla sambondunum við at menna eina úrvalsætlan.

Innihald í úrvalsætlanini er:

- *Málsetan*
- *Avgreidd ítróttalig avrik*
- *Framsøkin ítróttalig avrik*
- *Langtíðarætlan*
- *Ársætlan*
- *Fíggjarætlan*
- *Ábyrgdarfólk*
- *Menningarmøguleikar og menningarmálsetan*
- *Nágreinilig ætlan fyri úrvalsítróttarfólkið/liðið*
- *Luttøka í kappingum*

# Samrøða

Er tørvur á tí, kann Úrval kalla avvarðandi samband og ítróttarfólk, sum hava søkt um stuðul, til eina samrøðu.

# Umsóknarfreist

Nevndin í Úrvali viðger umsóknir eina ferð árliga . Umsóknarfreistin er:

- ***15. oktobur***

Bert fullfíggjaðar umsóknir verða viðgjørdar. **Nevndin í Úrvali skal svara avvarðandi sambandi skjótast gjørligt eftir, at umsóknarfreistin er farin. Tó seinast eftir 8 vikur.** Umsóknarfreistin til menningartiltøk er tann sama sum tilmeldingarfreistin á teimum ymisku tiltøkunum.

# Sáttmáli millum ÍSF og avvarðandi samband

Sum partur av stuðlinum skal avvarðandi samband og ÍSF undirskriva ein sáttmála. Sáttmálin er ein játtan partanna millum, ið fevnir um nágreiniliga stuðulin, ið verður givin avvarðandi íðkara/liði hjá sambandinum, og tær treytir, ið fylgja við stuðlinum.

# Frágreiðing til ÍSF

Sum partur av stuðlinum hevur avvarðandi samband ábyrgd av regluliga at kunna Úrval um úrvalsarbeiðið. Sum vegleiðing kann ein frágreiðing sendast Úrvali 2 ferðir um árið. Frágreiðingin skal innihalda eina meting av, hvussu gongur við at fylgja úrvalsætlanini.



# Stuðulstreytir

Minsta krav fyri at fáa stuðul frá Úrvali er, at úrvalsítróttarfólkið er føroyingur (sí evstulóg hjá ÍSF), síðani skal íðkarin/liðið og avvarðandi samband lúka krøvini, ið eru stillað. Aftur at hesum væntar Úrval, at úrvalsítróttarfólkið/liðið er sinnað at menna føroyskan úrvalsítrótt í síni heild. Hetta kann gerast við, at úrvalsítróttarfólkið er limur í einum føroyskum ítróttarfelag, ítróttarfólkið/liðið kappast í FM ella á ymiskan hátt gevur aftur frá síni vitan og upplivingum, so at úrvalsítróttarumhvørvið í Føroyum støðugt mennist. Eftir hetta skal úrvalsítróttarfólkið/liðið og úrvalssambandið fylgja stuðulstreytunum.

## Nýtsla av fíggjarligum stuðli

Stuðulin skal einans nýtast til virksemi, ið beinleiðis er knýtt at úrvalsvirkseminum hjá sambandinum. Úrvalsvirksemi er alt virksemi, ið beinleiðis miðar eftir at røkka bestu ítróttaligu avrikum í altjóða kappingum. Stuðulin kann ikki nýtast til breiddarvirksemi ella líknandi partar av virkseminum hjá sambandinum.

Stuðulin kann til dømis nýtast til útreiðslur knýttar at:

- kappingum, ferðing og uppihaldi, sum ikki verður goldið av puljunum hjá ÍSF.
    - Sí "*Reglugerð fyri stuðul til altjóða kappingar uttanlands*", "*Reglugerð fyri stuðul til altjóða kappingar í Føroyum*", "*Reglugerð fyri stuðul til EM- og HM-kappingar*".
- venjingarlegum
- venjarum
- úrvalstiltøkum
- tænastum hjá Úrvalsmiðstøðini
- útgerð (í mesta lagi 15 % av samlaða stuðlinum)
- øðrum virksemi, ið er beinleiðis knýtt at úrvalsíðkarunum ella úrvalsvirkseminum

Stuðulin kann ikki nýtast til at gjalda úrvalsítróttarfólkinum løn ella til persónlig endamál. Stuðulin skal einans nýtast til úrvalsvirksemið hjá sambandinum.

15 % av samlaða stuðlinum kann fara til útgerð, ið beinleiðis verður nýtt av úrvalsíðkarunum ella í úrvalsvirkseminum hjá sambandinum. Úrval skal góðkenna slík keyp.




## Tiltøk og væntanir av teimum, ið fáa stuðul

Tú (úrvalsítróttarfólkið) skalt kunna luttaka í tiltøkum hjá Úrvali á leið eina ferð um árið. Hesi tiltøk verða løgd soleiðis til rættis, at tey ikki ávirka venjing ella kappingar hjá tær. Hetta kunnu vera tiltøk, ið Úrval skipar fyri og dømir eru: Framløgur, ítróttardagar, evnisdagar og tílíkt.

Úrval veitir stuðul í samstarvi við samband títt, so at tú fært hildið og ment hægsta altjóða støði í ítróttargrein tíni. Afturfyri vænta vit av tær, at tú gert títt ítasta at mennast so nógv sum gjørligt. Vit vænta eisini av tær, at tú gert tær greitt, at tú, við stuðlinum frá Úrvali, ert við í einum størri felagsskapi. Tú ert eitt týdningarmikið andlit fyri Úrval, samband títt, felag títt og allar Føroyar.

Tú verður fyrimynd, og vit vænta av tær, at tú kennir teg aftur í hesum málum:

1. Eg taki ábyrgd av egnari menning, og eg strembi altíð eftir at menna meg sum mest. Eg seti mær og teimum kring meg høg mál.
2. Eg veit og viðurkenni, at eg eri fyrimynd í kapping og í gerandisdegnum, og eg gangi undan sum góð fyrimynd hjá øðrum ítróttafólkum. Fyri ítróttin, fyri felag mítt, fyri samband mítt, fyri Úrval og fyri Føroyar.
3. Eg sýni trúskap móti felagi mínum, sambandi mínum, Úrvali og Føroyum.
4. Eg íðki ítrótt mín etiskt ábyrgdarfult.

## Doping

Úrvalsítróttarfólk hjá sambondum, ið fáa stuðul, skulu fylgja dopingreglunum hjá WADA. Brýtur ítróttarfólkið dopingreglurnar hjá WADA, og avgerð fellur í málinum, skal Úrval viðgera støðuna og taka avgerð um stuðulin og sáttmálin, Úrval og samband ímillum, verða ógildaðir. Úrval hevur heimild at steðga samstarvinum beinanvegin og at krevja latnan stuðul aftur. Avvarðandi samband kann søkja um stuðul frá Úrvali aftur til avvarðandi ítróttarfólk, eftir at øll viðurskifti eru komin í rættlag.

## Aldursmark

Stuðul verður bert latin til sambond, ið søkja vegna íðkarar, ið eru fyltir 16 ár.

## Frágreiðing skal sendast til ÍSF

Avvarðandi samband (stig 1-4) hevur ábyrgd av at lata Úrvali eina frágreiðing tvær ferðir um árið.

## Skattur

Stuðul veittur frá Úrvali, sum avvarðandi samband nýtir til samsýningar, skal verða goldin sambært galdandi skattalóggávu.

## Trygging

Sambandið skal veita úrvalsítróttarfólkinum eina galdandi trygging, sum uppfyllir krøvini fyri at fáa almenna sjúkraviðgerð.

## Útgjald

Úrval skipar útgjøld í samráð við avvarðandi samband.

## Ábyrgd og endurgjald

Broytast umstøðurnar munandi, til dømis um grundarlagið undir umsóknini ikki heldur, tilskilar Úrval sær rætt at gera av, um stuðulin skal gjaldast aftur heilt ella lutvíst.

## Brot á sáttmála ella treytir

Heldur umsøkjari ikki skyldu sínar sambært sáttmálanum og treytunum fyri stuðli, tilskilar Úrval sær rætt at siga sáttmálan upp beinanvegin og krevja stuðulin afturrindaðan.


SMYRIL

# Reglugerð og leiðreglur

## Reglugerð

### § 1 Navn og heimstaður

Ítróttasamband Føroya hevur sett á stovn nevnd við navninum "Úrval". Nevndin virkar úr sama stað sum ÍSF.

### § 2 Endamál

Úrval er nevnd, sum umsitur stuðul til føroyskan úrvalsítrótt.
Endamálið hjá Úrvali er:
a) at stuðla ítróttarfólkum og liðum at fremja ítrótt sín á hægsta stigi
b) at stuðla ítróttarfólkum og liðum at umboða Føroyar í altjóða kappingum
c) at gera tað møguligt hjá ítróttarfólkum at sameina ítrótt, útbúgving og arbeiði
d) at veita stuðul, sum skal menna føroyskan úrvalsítrótt

### § 3 Nevnd

Í Úrvali eru fimm limir: Formaður, næstformaður og tríggir nevndarlimir. Nevndarlimir verða valdir á aðalfundi hjá Ítróttasambandi Føroya eftir tilmæli frá starvsnevnd ÍSF's.
Tað verður valdur ein formaður, ein næstformaður og tríggir nevndarlimir. Valskeiðið er tvey ár.
Tveir nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár (makaár), og tríggir verða valdir annaðhvørt ár (støkár), soleiðis at annaðhvørt ár standa formaðurin og ein nevndarlimur fyri vali (makaár) og annaðhvørt ár næstformaðurin og tveir nevndarlimir (støkár).
Fimti nevndarlimurin verður valdur eftir tilmæli frá avvarðandi aðalráði.
Fer nevndarlimur úr nevndini í úrtíð, velur aðalfundurin hjá ÍSF nýggjan lim.

### § 4 Virksemi og umsiting

Úrvalssamskiparin er skrivari í úrvalsnevndini. Úrvalssamskiparin og skrivstovan hjá ÍSF taka sær av umsitingarliga arbeiðinum.
Nevndin førir gerðabók yvir allar fundir.
Nevndarformaðurin stýrir nevndarfundunum.
Tá ið atkvøtt verður, er vanligur meiriluti galdandi. Stendur á jøvnum í atkvøðugreiðslu, er atkvøða formansins avgerandi.
Formaðurin hevur skyldu at kalla til fund, tá ið hann metir, tað er neyðugt, ella tá ið tveir
nevndarlimir ynskja tað. Tað liggur á formanni nevndarinnar at ansa eftir, at hildnir verða minst 4 nevndarfundir árliga.
Nevndarlimir fáa ikki løn.

## § 5 Roknskapur, grannskoðan og ársfrágreiðing

Roknskapirnir verða grannskoðaðir av uttanveltaða grannskoðaranum hjá ÍSF.
Roknskaparárið er álmanakkaárið.
Roknskapir og frágreiðing um virkið hjá nevndini verða á hvørjum ári løgd fyri aðalfundin hjá ÍSF, og verður grannskoðaður roknskapur og frágreiðing um virkið hjá Úrvali send landsstýrinum.

## § 6 Virksemi

Úrval ger sjálvt starvsskipan fyri virksemi sítt.

## § 7 Viðtøkubroytingar

Nevndin í Úrvali kann broyta í viðtøkunum hjá Úrvali, um meiriluti er fyri hesum í nevndini, og skulu hesar broytingar góðkennast á aðalfundi ÍSF's. Starvsnevndin hjá ÍSF kann broyta í viðtøkunum, og skulu hesar broytingar góðkennast á aðalfundi ÍSF's. Nevndin í Úrvali fær øll broytingaruppskot til hoyringar.

## § 8 Avtøka

Er nevndin í Úrvali samd um at avtaka Úrval, kann slík avgerð bert setast í verk við góðkenning á Aðalfundi hjá ÍSF. Um starvsnevndin vil avtaka Úrval, kann slík avgerð bert setast í verk við góðkenning av aðalfundi ÍSF's.

# Leiðreglur fyri Úrval

Úrval kann endurskoða skipanina so hvørt, og skal niðurstøðan tá góðkennast á aðalfundi hjá ÍSF.
Nevndin ger neyvari starvskipan fyri virksemi sítt sambært § 6 í reglugerðini.
Nevndin ger neyvari mannagongdir fyri virksemi sítt.
Nevndin skal gera eina ítøkiliga meting av støðuni hjá ítróttarfólkinum í mun til heimsstyrkilistan.
Nevndin kann í sambandi við metingina av heimsstyrkilistanum og øðrum søkja sær ráðgeving og hjálp frá serkunnleika.